Kyndil-StÍF 20-24 (9-13):

Kyndil avbyrgt

Heldur ikki á heimavølli móti StÍF bar til hjá Kyndli, og nú ber illa til at ímynda sær nakra aðra lagnu enn botnsessin

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Talan var um uppgerð millum tvey av avgjørdu botnliðunum, tá StÍF vitjaði Kyndil í kvinnudeildini.

StÍf byrjaði annars árið væl, men frágongd hevur rakt liðið, sum spakuliga er dottið alt longur niður á talvuni. Somikið langt, at Kyndil nú hevði møguleika at taka tær mest sum aftur, um tær vunnu dystin sunnudagin.

Hjá StÍF ráddi hinvegin um at fáa stigini við sær, so fjarstøðan niður kundi økjast nakað, og hetta eydnaðist teimum eisini.

Rættvísur sigur

Tað var alla tíðina StÍF, sum hevði betra spælið í dystinum. Tær megnaðu at spæla skjótari í álopinum, og verjan hekk betri saman, og longu fyrsta korterið høvdu tær av álvara møguleikar at skapa sær eina hampuliga leiðslu.

At hetta ikki hendi, kann Kyndil helst bara takka Friðu Petersen í málinum fyri. Hon hevði fleiri framúr bjargingar, men so hvørt sum hálvleikurin leið, fingu skjúttarnir hjá StÍF tó alt betri tak á henni, og tí fór munurin so spakuliga at kvinka uppeftir.

Seinna umfarið var at kalla sama søgan. StÍF sýndi ongan tíð nakað sum helst tekin um at tveita leiðsluna frá sær, og tó at Kyndil royndi við ymsum snildum, so megnaðu tær ongan tíð at vinna tað mista innaftur.

Enda á botni

Tað tykist heldur ikki, sum um Kyndil longur hevur nakran møguleika at sleppa av botnsessinum, sum liðið hevur hildið heitan alt árið.

Sjálvandi ber tað til í teoriini, at liðið kann vinna Søljuna aftur, men sum avrikini hava verið seinastu vikurnar hjá hesm báðum liðum, so er í øllum førum væntandi, at Kyndil heldur ikki ta ferðina fer at fáa nakað stig við sær.

Dysturin í tølum

Kyndil-StÍF 20-24 (9-13)

Málskjúttar

Kyndil: Randi Wardum 6, Linda Weihe 3, Ann-Mari Wang 3, Annika Thomsen 2, Anja Heinadóttir 2, Lotte Sørensen 2(1), Sabine Frølund 1, Hildur Mikkelsen 1

StÍF: Poula D. Olsen 6, Anna B. Danielsen 6, Milica Ergic 4, Ninna K. Johansen 4, Sunfríð B. Jacobsen 2(2), Beinta Joensen 1, Paula B. Høgnesen 1

Brotskøst: Kyndil 4, StÍF 6

Útvísingar: Kyndil 1, StÍF 2

Dómarar: Kristian Johansen & Sámal Hansen. Høvdu ongar trupulleikar av nøkrum.

Randi Wardum og hinar í Kyndli noyðast helst at ásanna, at tær ikki koma av aftasta plássi í landskappingini í ár

Mynd: Álvur Haraldsen

Avgreiðslusigur hjá Stjørnuni

Hóast tað tók eina løtu hjá Stjørnuni at koma í gongd í landskappingardystinum móti Søljuni í KÍhøllini sunnudagin, so var talan um ein avgreiðslusigur til Stjørnuna

HONDBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Nú verður bert bíðað eftir dystinum millum VB og Stjørnuna

Savnsmynd

Í løtuni sær tað út til, at avgerðin um føroyameistaraheitið hjá kvinnum fellur í Vági í næstseinasta leikufari tann 27 mars, táið oddaliðini bæði VB og Stjørnan hittast. Sum leikur gongur í løtuni, eru tað eingi av hinum liðunum, ið ger nakað við tey, uttan møguliga VÍF ið fær vitjan av Stjørnuni í Vestmanna stutt frammanundan. Dystirnir hjá oddaliðunum báðum móti øllum hinum liðunum tykist bert verða ein spurningur um avgreiðslu, og so var eisini, tá ið klaksvíkskvinnurnar høvdu vitjan av vágakvinnum sunnudagin.

Søljan helt tørn fyrstu løtuna

Tað gekk tó ein løta, áðrenn heimaliðið av álvara fekk gongd á sítt spæl. Heldur hinvegin vóru tað kvinnurnar úr Vágum, ið settu sín dám á dystin. Søljan byrjaði heilt væl, og tað mundi koma eitt sindur óvart á tey flestu, at tá ið fyrri hálvleikur var gott og væl hálvrunnin, høvdu gestirnir úr Vágum lagt seg á odda 9-7!

Nú tóku vertirnir timeout, og eftir at venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Nielsen, hevði sagt sínum leikarum nøkur borgarlig orð, kom betur stýr á spælið hjá Stjørnuni. Serliga vóru tað Joan M. Djordjevic og Annika Ljóstein, ið fingu glið á spælið hjá sær. Í hinum endanum bleiv verjan hjá Stjørnuni eisini tøtt, og síðstu trettan minuttirnar av fyrra hálvleiki fekk Søljan bert tvey mál! Hetta gjørdi, at tá ið komið var til hálvleiks, høvdu vertirnir úr Klaksvík lagt seg á odda 17-11, og so var tann dysturin avgjørdur:

Tamur seinni hálvleikur

Eftir steðgin var støðan at kalla tann sama. Stjørnan hevði allatíðina munin, uttan at tær tó spílaðu seg út, og munurin millum liðini øktist spakuliga. Joan M. Djordjevic hevði ein av sínum heilt góðu døgum sunnudagin, og tá ið hon hevur ein góðan dag, hevur liðið eisini ein góðan dag. Joan skoraði ikki færri enn tíggju mál, og tað er als ikki gerandiskostur hjá henni.

Bæði liðini tókust bara at vilja hava tíðina at ganga, og tá ið dómararnir báðir, Høgni M. Joensen og Brandur Johansen, bríkslaðu seinasta bríkslið í dystinum, hevði heimaliðið Stjørnan vunnið við tólv málum á Søljuni, 32-20, framman fyri trúfastu áskoðarafjøldini í KÍhøllini.

Sum áðurnevnt tykist avgerðin um føroyameistaraheitið at falla í Vági í næstseinastaleikumfari, men Stjørnan hevur ein truplan dyst í Vestmanna eftir um góðar tvær vikur. Tá ið klaksvíkskvinnurnar vóru og vitjaðu VÍF í grundspælinum, eydnaðist tað teimum við bit og slit at vinna við einum máli, so tað verður neyvan nøkur lætt uppgáva, ið bíðar eftir teimum í Vestmanna.

Dysturin í tølum

Stjørnan-Søljan 32-20 (17-11)

Stjørnan: Joan M. Djordjevic 10(4), Annika Ljósstein 6(1), Alina Olaru 5, Bára Skaale Klakstein 4, Catarina Stepanov 3, Una Olsen 2, Anna Kristina Samson 2

Søljan: Fía Selma Nielsen 6, Nicoletta Radu 4(1), Heidi Maria Akselsen 4, Arnleyg Haraldsen 3, Hertha Simonsen 2, Petra Thomassen 1

Brotskøst: Stjørnan: 8(5), Søljan 2(1)

Útvísingar: Stjørnan 1, Søljan 6

Dómarar: Høgni M. Joensen og Brandur Johansen

Neistin gav VB skarpan gang

Sunnudagin skuldu vágskvinnur reisa seg eftir steypatapið, tá ið Neistin kom suður á vitjan, men tað var ikki nøkur lætt uppgáva

HONDBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Marjun Tróndarson og hinar í Neistanum noyddust at boyggja seg fyri Daivu og VB í Vági sunnudagin

Neistakvinnurnar vóru ikki farnar suður um fjørðin fyri at leggja rygg til eitt tap, nei teir vóru farnar fyri at vinna dystin, og hetta kom kanska eitt sindur óvart á heimaliðið, ið helst hevur "finaludystin" móti Stjørnuni um góðan mánað fremst í huganum.

Gekk javnt á

Fyrri hálvleikur gekk rættuliga javnt á. Liðini skiftust um at hava leiðsluna, og ikki fyrr enn tað nærkaðist hálvleiki, fór heimaliðið nakað frá gestunum, millum annað takkað verið trimum brotskøstum, ið tær fingu síðstu átta minuttirnar fyri steðgin.

Neistin var á odda 8-7 undan teimum seinasu átta minuttunum í fyrra hálvleiki, men so var tað sum álopið hjá Neistanum eisini vær, men gestirnir vóru ikki altíð nóg neyvir, tá ið høvi beyðst, og alt ov nógv skot blivu brend.

VB helt tørn

Í seinna hálvleiki hildu liðini fram, har tey sleptu fyri steðgin. Leikur gekk javnt á, men vágskvinnur høvdu allatíðina munin við nøkrum fáum málum. Spælið hjá føroyameistarunum koyrdi vær, men hinvegin vildu gestirnir úr Havn ongantíð sleppa endanum. Unga neistaliðið tók dystin upp við VB, og hóast heimaliðið eitt skifti í seinna hálvleiki legði seg á odda við átta málum, 24-16, kom spenningur aftur í dystin, tá ið Neistin fór at satsa.

Venjarin hjá Neistanum, Sophus Dal-Christiansen, valdi at mansverja báðar útlendingarnar hjá VB, og tað gav úrslit, tí tveir minuttir fyri leiklok var munurin komin niður á trý mál, og VB var á odda 25-22. Henda góða løtan hjá gestunum kundi roynst enn betur, tí tær loyvdu sær enntá at brenna eitt brotskast, og tær fingu eisini eina dupultútvísing hesa løtuna.

Tað eydnaðist tó vágskvinnum at gera sær dælt av offensivu verjuni hjá Neistanum síðstu tveir minuttirnir, og tær hildu tí tørn og vunnu dystin 28-23.

Um dystin kann sigast, at tær serliga vóru málmennin báðir, Asta hjá VB og Helena hjá Neistanum, ið gjørdu vart við seg, tí báðir spældu stak væl. Sum skilst kundi talan eisini bliva um ein enn meiri spennandi dyst, høvdu neistakvinnurnar ikki verið so mikið óneyvar í sínum atsóknum á málið hjá VB.

VB-Neistin 28-23 (13-9)

VB: Daiva Tomaite 11(2); Aukse Vysniaskaite 7(3), Gurið Mortensen 5, Rannvá Augustinussen 2, Margreth Augustinussen 2, Eydis Kjærbo 1

Neistin: Ása Dam á Neystabø 6, Simona Dzigyte 5(1), Lina Andriyte 4, Marjun Tróndarson 2, Susan Brockie 2, Lív Sørensen 2, Vivian Unadóttir 2

Brotskøst: VB 5(5) Neistin 2(1)

Útvísingar: VB 3, Neistin 6

Dómarar: Christian Joensen og Karstin Joensen

Máltindarnir

Kvinnur

Simona Dziugyte	Neistin	145	(24)
Aukse Vysniaskaite	VB	124	(33)
Nicoleta Radu	Søljan	121	(23)
Ioana Rápa	VÍF	104	(25)
Katarina Stepanov	Stjørnan	100	(20)
Daiva Tuomaite	VB	98	(16)
Sóley Mikkelsen	VÍF	91	(20)
Milica Ergic	StÍF	85	(10)
Gurið Mortensen	VB	84	(6)
Nikolina Eyðbjørnsdóttir	VÍF	82	
Irina Rodevici	VÍF	81	
Joan M. Djordjevic	Stjørnan	80	(28)
Annika Ljósstein	Stjørnan	79	(19)
Heidi Maria Akselsen	Søljan	75	(5)
Lina Andriulyte	Neistin	68	

Menn

Halgir D. Olesen	H71	93	(9)
Blagoje Buha	Neistin	90	(22)
Dragisa Stojovic	Neistin	88	(3)
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	82	(29)
Agnar Joensen	VÍF	65	(7)
Ingi Olsen	VÍF	65	(22)
Petur Martin Poulsen	KÍF	64	
Artur Johansen	StÍF	57	(11)
Áki Mørk	Neistin	55	(8)
Damir Oros	KÍF	55	(19)
Sámal Joensen	VÍF	54	(7)
Alexandur Johansen	StÍF	54	(21)
Jacob Jónsson	Kyndil	52	
Høgni Klein	Kyndil	51	(2)
Josef Abrahamsen	Kyndil	51	(8)

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Stjørnan	6	5	0	1	481	364	117	21
2	VB	5	5	0	0	453	345	108	18
3	VÍF	5	3	0	2	439	357	82	15
4	Neistin	5	3	0	2	432	390	42	14
5	StÍF	5	1	0	4	381	440	-59	7
6	Søljan	5	1	0	4	321	431	-110	4
7	Kyndil	5	0	0	5	280	460	-180	1

1. Deild menn

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Kyndil	3	2	0	1	381	348	33	13
2	Neistin	2	2	0	0	345	311	34	10
3	StÍF	3	1	0	2	316	307	9	9
4	VÍF	3	1	0	2	345	326	19	8
5	KÍF	2	1	0	1	292	342	-50	5
6	H71	3	1	0	2	314	359	-45	4